

## Grand Mistral kemur tvær ferðir á Havnina

Í gjár skrivaðu vit um ferðamannaskipið Grand Mistral, sum kemur til Íslands í summar. Men skipið kemur eisini til Føroya tveir ferðir í summar. Tað er Tor Shipping í Havn, sum umboðar skipið, sum kemur á Havnina 21. juli og 10. august. Skipið liggur tá á Havnini alla dagin. Annars tykist talið av ferðamannaskipum at vera vaksandi. Sambært Tor Shipping er talið at ferðamannskipum, sum koma hendavegin vaksandi - umleið 50 ferðamannaskip koma til Føroya í summar, fleiri nýggj reiðarí senda skip hendanvegin.

# in rættan skúla



*Útgerðin úr Føroyum er komin uppá pláss. Nú er bert eftir at tøma bingjuna og seta útgerðina upp. - Tey hava hvørki havt borð ella stólar áður, sigur Sigurd Lamhauge, samskipari*

ferð, at Uttanríkisráðið hevur viðurskifti við henda skúlan í Tanzania.

Bæði í 2007 og í 2008 játtaði Uttanríkisráðið pening til skúlan, sum longu tá hevði 70 næmingar, harav níggju teirra vóru foreldraleys.

Hóast skúlin als ikki hevði ta neyðugu útgerðina, varð tørvurin so stórur, at undirvíst mátti verða, hóast næmingarnir sótu á gólvinum í tímunum.

Lærararnir royndu sum frægast at undirvísa, men teimum vantaði kortini ymisk útgerð, m.a. skúlatalvur, sum eru standard í okkara skúlum.

Nú skúlin varð farin til verka, varð neyðugt við næsta leikinum - at fáa útgerð til næmingar og lærarar til vega. Teir vistu um góðviljan úr Føroyum, og sendu so enn eina umsókn til Uttanríkisráðið um skúlaútbúnað.

### Rættir lærarar

Á fundi í nevndini fyri menningarsamstarv undir Uttanríkisráðnum varð umsóknin viðgjørd við vælvild. Og samtykt varð eisini at fáa ein samskipara at taka sær av innsavning, sending og uppseting.

Beinanvegin sum Sigurd var settur sum samskipari, fór hann til verka.

Samband varð fingið við Dugna og sølustað teirra, nevnt Tinghúsið á Hjalla, haðani øll útgerðin er keypt.

Okkurt av hesi kravdi smærri ábøtur, og hetta tóku timburnæmingar á Tekniska Skúla í Havn sær av. Onnur útgerð til skúlan varð eisini fingin til vega, til dømis kopimaskina og uppvørpur. Og skúlatalvan hoyrir sjálvandi við til útgerðina.

- Tað var stuttligt at síggja lærararnar, tá teir fyrstu ferð kundu seta seg aftanfyri ein veruligan lærarapult. Tað var týðiligt at merkja, at teir nú føldu seg sum rættar lærarar, greiðir Sigurd frá.



*Áðrenn tey fingu gávuna úr Føroyum kendu tey einki til borð, stólar og talvur. Nú er vent í holuni. Næmingarnir føla seg væl og lærararnir kunnu nú kenn seg sum rættir lærarar*

## Burtur úr fátækradøminum

Hvønn týdning ein so lítil verkætlan sum henda kann fáa fyri lokala økið, er ilt at meta um.

Við avmarkaða fíggjarliga grundarlagi sínum hevur skúlin bert virkað á einum minsta støði. Undirvíst verður í støddfrøði, swahili-máli, ítrótti, enskum, almennari vitan og í evning hvønn fyrrapart.

Tað sjáldsama er, at tað er eitt krav, at børnini hava gingið í barnagarði fyri at koma í barnaskúla. Orsøkin til hetta er, at tey mugu duga at lesa áðrenn.

Nevnast kann eisini, at menningarvirðið við ætlanini er stórt. Bert við sløkum 42.000 kronum kann ein reka henda skúlan við teimum 70 næmingunum.

Sigurd Lamhauge hevur tó gjørt sær sínar hugsanir um, hvat tað vil siga fyri eitt øki at hava, ikki bert ein skúla, men ein skúla sum hevur góð amboð og góða útgerð til undirvísingina.

- Tað er heilt víst, at nú børnini rættiliga eru sloppin í skúla, fer hetta at geva teimum ein møguleika at koma út úr fátækradøminum, sigur hann.

## Menningarsamstarv í dag

Høvuðsendamálið við lógini um altjóða menningarsamstarv er at virka fyri at minka um búskaparliga ójavnan í heiminum við burðardyggum menningarsamstarvi.

Umframt høvuðsendamálið hevur landsstýrið sett sær sum mál at skapa føroyingum og føroyska samfelagnum royndir, kunnleika og áhuga fyri triðja heiminum og altjóða viðurskiftum sum heild.

Fyri at røkka hesum endamáli er avgjørt, at fyrstu árini verður menningarsamstarv útint eftir hesi raðfestingar:

Menningarhjálp skal bert latast londum, sum OECD skilmarkar sum menningarlond.

Orka skal leggjast í at byggja upp samstarv við altjóða viðurkendar hjálparfelagsskapir – stjórnarligar sum sjálvbodnar – fyri síðan at vera saman við hesum felagsskapum um menningarverkætlanir

Har til ber, skal menningarsamstarvið skapa møguleikar fyri virknari, føroyskari luttøku

ST mælir ídnaðarlondum til at gjalda 0.7% av bruttotjóðarinntøku síni til altjóða menningarsamstarv. Í royndum lata hesi lond bert 0.47% í miðal. ST hevur síðani samtykt, at í 2015 skulu ríku londini halda síni lyfti, og ávegis er sett sum mál, at í 2009 eiga londini at lata 0,5% av bruttotjóðarinntøku síni til hetta arbeiði.

Henda samtyktin hjá ST er einans galdandi fyri sjálvstøðug lond og fevnir tískil ikki um Føroyar. Hóast altjóða samfelagið einki væntar sær av okkum, tykist politisk semja vera um, at Føroyar eiga at seta sær sum mál at lata munandi meiri av bruttotjóðarinntøkuni til arbeiðið.

Sum nú er, lata vit 3.5 mió. kr. til menningarsamstarv, sum í 2007 vóru um 0.03% av bruttotjóðarinntøku. Tað fara við vissu at ganga nógv ár, áðrenn vit náa málinum um 0.7% av BTI, sum í dagsins tølum vildi verið 80.5 mió. kr., tó eigur tað ikki at forða okkum at seta sum mál, at økja árligu upphæddina við til dømis 0.02%.

At umsita lóg um altjóða menningarsamstarv, er kunngerð sett í gildi, sum lýsir neyvari treytir og reglur fyri, hvør kann fáa stuðul, og nær og hvussu stuðulin verður játtaður.

At fremja lógina í verki, er ráðgevandi nevnd sett, sum arbeiðir eftir ásettari fyriskipan.

*(Kelda: mfa.fo)*